18,00 **FM í svimjing**
20,00 **Melodi Grand Prix 1998**
23,00 **Gygl** 1:2 - am. stuttrøð
Høast Jazz ferðast millum tey ríku, tey ungu og vøkru hevur hon bæði beinini á jørðina. Men kortini verður hon púrasta burtur í tí bedárandi krigsfotografinum, Gabe.
Eftir skaldsøgu hjá Judith Krantz. Lisa Hartman Black hevur leiklutin sum Jazz. Aðrir leikarar: Bruce Greenwood, Jeffrey Meek o.o.
2. partur verður sendur sunnukvøldið.
00,35 **Ferðaliðið**
Tvey konufólk leypa á eina pengatransport á alljósum degi. Bert eitt vitni yvirlivir blóðuga gísladramaið - tann vakri og vælhavandi Frances. Men Frances er ikki tann, hann sigur seg vera.
Leikarar: Pooky Quesnel, Mark Aiken, Reece Dinsdale o.o.
01,25 **Liðugt**

Sunnudagur 10. mai
12,30 **Formel 1 koyring í Barcelona, Spania**
15,00 **Á føroyskum kjøli úr Kili til Klaksvíkar** 3 (e)
15,40 **Pipar og Salt** 3 (e)
16,05 **Barnamøti í Betesda í Klaksvík**
17,10 **Titanic - tey sum sluppu við livinum** - Amerikonsk dokumentarsending.
Ein kossur, eitt orð ella ein lítil heilsan er tað seinasta minnið, tey sum sluppu undan við livinum høvdu eftir teimum, tey vóru góð við - eftir teimum, sum lótu liv við størstu skipsvanlukku í okkara øld.
18,00 **Kontrapunkt**
19,00 **Matador** 23
Matstovan á jarnbreytarstøðini hevur fingið nýggja vertinnu. Jørgen hittir Gitte aftur, og tað verður hansara undirgangur. Kristin og Elisabeth verða gift, og Kristin fær stjórastarv í Keypmannahavn.
20,00 **Andakt**/ Torleif Johannesen
20,10 **Á føroyskum kjøli úr Kili til Klaksvíkar**
Í fjørðu og seinastu sending sigla vit gjøgnum Panama veitina, síðani verður kósin sett móti Karmoynni í Norra. Sunnudagin 15. mars verður siglt inn á Klaksvík, har stór móttøka er fyri nýggja Christian í Grótinum.
Í Panama vitja vit fyrstu slúsurnar og siggja eitt risa bingjuskip fara oman eftir teimum. Um kvøldið verður Christian í Grótinum drigin av lokmotivum inn í fyrstu slúsurnar.
Á ferðini tvørtur um Atlantshavið verður tosað við nakrar av manningini. Ferðin tók 14 dagar og var nakað baldrut.
Frá sól og summari í Suðurameríka koma vit fyrst í mars til kulda og vetur í Norra.
Móttøkan í Klaksvík var stórsligin og fleiri politikkarar og vinnulívsmenn vitjaðu umborð.
Lagt til rættis og sett saman hava Zacharias Hammer og Jógvan Eli Dam.
20,50 **Gygl** 2:2 - am. stuttrøð
Jazz kemur heim aftur bert fyri at fáa tey skelkandi tíðindi, at pápi hennara, Mike, er dottin niður við sínum flogfari, og Jazz arvar garðin. Hetta eru hálvstýrar hennara ógvuliga ónøgdar við, og tær gera alt fyri at fáa hana at selja garðin.
Jazz: Lisa Hartman Black Casey: Bruce Greenwood Gabe: Jeffrey Meek. Laurence Heath gjørdi leikrit eftir skaldsøgu hjá Judith Kranzt.
22,25 **Innskot - Hanus um Janus**
Hanus Andreassen tosar um verkið um Janus Djurhuus skald, sum Hanus nú endaliga hevur latið úr hondum.
Talan er um trý bind, sum viðgera samtíðina og lívið hjá skaldi okkara J.H.O. Djurhuus.
Lagt til rættis hevur Ólavur Rasmussen.
22,45 **Myrkursins vald** 1:2 - ensk

Leygardagur 9. mai
07.15 **Tíðindi**
07.17 **Morgunlestur** - Rógvi Egilstoft í Sandavági lesur
07.30 **Tíðindi**
07.35 **Morguntónleikur**
08.00 **Tíðindi**
08.05 **Millum 8 og 9** - Kim Hansen velur løgini
09.00 **Tíðindi**
09.05 **Morgunlestur** (e)
09.15 **Dagsins tónar**
09.30 **Børnini og vit**
Anna Sofia Hvítklett og Jorita Winther Jensen leggja til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan 150**
10.10 **Lurtararnir og vit**
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Burtur á heiði** - Birgir Kruse skipar fyri (e)
12.00 **Tíðindi**
12.01 **Middagtónleikur**
12.20 **Tíðindini**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Vikan ið fer** - Høgni Djurhuus tekur samanum
14.00 **Vikuskiftið** (e) Suni Merkistein og Mildrið Jacobsen leggja til rættis
15.00 **Menuettin** - Jóannes S. Hansen velur løgini
16.00 **Brøv til Jákup doktara** - 3. partur av sendirøð hjá Marionnu Debes Dahl. (e)
17.00 **Fríkorterið** (e)
17.30 **Brøv til Jákup doktara** - 4. partur av sendirøð hjá Marionnu Debes Dahl. (e)
18.30 **Tíðindini**
18.40 **Itróttatíðindi**
19.00 **Indiánararnir í Norðuramerika**
Hetta er næstseinasta sendingin í røðini um indianararnar í Norðuramerika. Puebloindianararnir búðu í oyðimørkini har suðuri í miðvestri í USA. Teir vóru friðarfólk, men tá ið á stóð, var ikki lukkuligt at vera fyri. Teir hava dugað sera væl at lívbjarga sær í tí karga landslagnum í vestara parti av Texas, Arizona, New Mexico og Mexico. Sonna Smith tosar við Hans Holm.
20.00 **15 tær bestu** - Heðin Arge skipar fyri
21.00 **Gomlu dansirnir** - Flóvin Jacobsen ger sendingina
21.50 **Hetta heilaga evangeliið skrivar** - Marjun Bæk leggur til rættis
22.00 **Tíðindi**
22.10 **Náttarravnar** - Heðin Arge og Rúni Jákupsson eru í útvarpsstovuni
01.00 **Liðugt**

Sunnudagur 10. mai
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Barnaútvarpið**
10.30 **Sálmar og sangir** - Kórtónleikur eftir Felix Mendelssohn-Bartholdy Ólavur Jøkladal leggur til rættis
11.00 **Grammofonkonsert**
12.00 **Guðstænasta í Sandvíkar Kirkju** - Andreas Andreasen prestur prædikar
13.10 **Úr Norðradali** - Brot úr endurminningum hjá Óla Reinert - Jógvan Arge lesur.
13.40 **Fegnast fólk og fegnast fæ** Føroyskir sangir. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 **Tíðindini**
14.15 **Brøv til Jákup doktara**
Í fimtu sendingini fara vit at hoyra um, at Kristin í Geil sendir Dr. Jakobsen nýggja uppskrivt av Torsteins tátti og O.N. Skaalum sendir honum Hábarskvæðið. Larence Williamson er komin aftur til Hetlands, og er stúrin um øll tey gomlu, sum fara ov skjótt, áðrenn nóg mikið av orðum og nøvnum á Norn-máli eru skrásett. Jóan Chr. Poulsen í Hesti sigur frá, at har ætla tey sær undir at týða bibliuna. Skyldkonan Súsanna Jacobsen skrivar úr Akrabergi, hvussu Nólsoyar Páll mundi siggja út. Marianna Debes Dahl leggur til rættis.




Tommy Lee Jones er U. S Marshal Sam Gerard, og Wesley Snipes er maðurin, hann jagstrar. Við øllum miðlum. Móti øllum oddsum. Fyri tann misteinkiliga dupultdrápsmannin er eftir øllum at døma dupult so góður at yvirliva sum øll onnur í hesum eksplosiva aksjónfilminum, sum Stuart Baird hevur gjørt.
Stjørnu-emblemið, sum verður borið av teimum bestu og mest undirhaldandi handhevarum av lóg og ordan í USA, hevur yvirlivað The Wild West. Ein U. S. Marshal kundi og kann fara um statsmørk á síni støðugu og treisku jagstran eftir brotsmonnum. Í U. S. Marshals hitta vit nútíðarútgávuna av amerikanskum serfrøðingum í aktivar og lógligar mannajagstran.
Mark Roberts verður fløktur inn í eitt ferðsluóhapp í Chicago. Óhappið vísir seg at vera eitt sindur meira álvarsligt, enn av fyrstan tíð hildið. Hann hevur fingið nakrar skrammur, men við eina rutinukanning verður staðfest, at hansara fingramerki kunnu seta hann í samband við tvey brutal dráp av tveimum Secret Service agentum í New York
... Og tað er sanniliga álvarsamt

15.00 **Kvøduljómar**
16.30 **Í vingarðinum**
17.30 **Tónleikasøgan Veroldin sum var** - Triðja sending. Ove Olsen leggur til rættis
18.30 **Tíðindi**
18.40 **Itróttartíðindi**
19.00 **Veðurtíðindi**


Mánadagur 11. mai
07.15 **Tíðindi**
07.17 **Morgunlestur**- Bjarni Bæk í Havn lesur
07.30 **Tíðindi**
07.35 **Góðan morgun Føroyar** Jákup Magnussen
08.00 **Tíðindi**
08.05 **Góðan morgun Føroyar**
09.00 **Tíðindi**
09.05 **Morgunlestur** (e)
09.15 **Dagsins tónar**
09.30 **Løgfrøðingurin** - Jógvan Jespersen tosar við Sigmund Poulsen
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** 151
10.10 **Lurtararnir og vit**
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Í vingarðinum** (e)
12.00 **Tíðindi**
12.01 **Middagstónleikur**
12.15 **Veðurtíðindi og skrá**
12.20 **Tíðindini og itróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Indiánararnir í Norðuramerika** - Sonne Smith prátar við Hans Holm (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** Arne Thomsen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Vit ungu** - Annfinn Jacobsen stílar fyri
17.00 **Tíðindi**
17.05 **Rót og rútma** - Petur Rouch spælir countrytónleik
18.00 **Løgfrøðingurin** - Jógvan Jespersen tosar við Sigmund Poulsen (e)
18.25 **Veðurtíðindi og skrá**
18.30 **Tíðindini**
18.55 **Orð og mál** - Eivind Weyhe
19.00 **Vetrarbreytin**
Gestur á seinastu Vetrarbreytini fyri summarsteðg Útvarpsins er danska Lisbeth Ålgreen. Hon er fødd í 1936, er skeiðsleiðari í danska ríthøvundafelagnum og hevur um hendi alt dagligt arbeiði við Danska Ríthøvundaskúlan. Hetta er tvey ára skúli, sum byrjaði í 1987. Lærari tá var ríthøvundurin Poul Borum sáli. Stutt eftir byrjanina vitjaðu tey í Føroyum og ætlanin er aftur at vitja hendan vegin í november.
Í ár vóru 160, ið søktu um at sleppa inn á Danska Ríthøvundaskúlan. Tá avtornar, verða bert eini 5-8 tikin inn.
Tað eru danskir ríthøvundar, sum hava tikið stig til henda sermerkta skúla. Teirra millum eru áðurnevndi Poul Borum, Peter Seeberg, Villy Sørensen, Ib Mlchaelsen o.fl. Í 1996 varð skúlin góðkendur av myndugleikunum ájavnt við framhaldslestur við eitt nú Kunstakademiið og Musikkonservatoriið.
Á Vetrarbreytini verður Lisbeth Algreen spurd um ein kann *læra* til ríthøvunda og hvussu tey á skúlanum leggja undirvísingina til rættis. Eisini verður spurt um, hvussu ein kann søkja og verða upptikin.
Í sendingjini hoyra vit eisini um filmstiðindatænastuna Ain't Cool News, sum ein 26 ára gamal maður í Texas rekur á internetinum. Dagliga vitja einir 250.000 lesarar heimasiðu hansara, sum hevur adressuna http://www.aint-it-cool-news.com/
Undirvísingarmálastýrið í Danmark letur á hvørjum ári virðislønina »Undervisningsmiddelprisen«. Vit hoyra um ársins bestu undirvísingarbók í Danmark.
Nú Norðurlandahúsið fyllir fimtan, fara vit at leita aftur til eina útvarpssending hjá Niels Juel Arge frá 1968. Fýra dagar eftir at Norðurlandahúsið í Reykjavík varð tikið í nýtslu, hevði hann hin 28. august 1968 fullfiggjaða frágreiðing frá hátíðarhaldinum, har eisini føroyingar vóru við. At heiðra Norðurlandahúsinum og tí norrøna, hoyra vit brot úr taluni hjá skaldinum Halldór Kiljan Laxness, sála, har hann heldur »den nordiske tanke« upp í móti »den moderne barbarisering«.
Bókavørður á Vetrarbreytini er Erhard Jacobsen. Hann starvast á Landsbókasavninum og fer fyri summarsteðgin at hugleiða um Hetlendska sambandið í bókmentaligum høpi.
Ríthøvundur á seinastu Vetrarbreytini hetta skeiðið er Lydia Didriksen, nevndarlimur í Ríthøvundafelag Føroya.
Vetrarbreytin verður endursend mikudagin 6. mai kl. 14.
Birgir Kruse leggur sendingina til rættis.
20.00 **Sálmar og sangir** - Kingo í føroyskari tradisjón - Martin Restorff Jacobsen leggur til rættis
20.30 **Framhaldssøgan „Sjógarpar"** eftir Rudyard Kipling - 12. partur - Jens Marius Hentze tyddi. Sverri Egholm lesur
21.00 **Kvøldarstundin** - Jónheðin Tróndheim skipar fyri
22.00 **Tíðindi**

Týsdagur 12. mai
07.15 **Tíðindi**
07.17 **Morgunlestur** - Bjarni Bæk í Havn lesur
07.30 **Tíðindi**
07.35 **Góðan morgun Føroyar** - Jákup Magnussen
08.00 **Tíðindi**
08.05 **Góðan morgun Føroyar**
09.00 **Tíðindi**
09.05 **Morgunlestur** (e)
09.15 **Dagsins tónar**
09.30 **Framhaldssøgan "Sjógarpar"** eftir Rudyard Kipling - 12. Partur (e) Jens Marius Hentze tyddi. Sverri Egholm lesur
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan 151**
10.10 **Lurtararnir og vit**
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Úr Norðradali** (e) Brot úr endurminningum hjá Óla Reinert - Jógvan Arge lesur
11.30 **Undir døgurð**
12.00 **Tíðindi**


HAVNAR BIO
★ Tlf. 11956 ★



Leygardagin 09.05. kl. 20[00]
Sunnudagin 10.05. kl. 22[30]




Leygardagin 09.05. kl. 20[30]
Leygardagin 09.05. kl. 23[15]
Sunnudagin 10.05. kl. 19[30]
Sunnudagin 10.05. kl. 22[15]



Leygardagin 09.05. kl. 23[00]
Sunnudagin 10.05. kl. 20[00]

KOMANDI FILMUR



Frumsýning fríggjadagin 15.05.

22.05.: Vi er din far
22.05.: 7 år i Tibet
29.05.: Hard Rain